LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 31. august 2020
J.Nr.: LUM-25- 20/00078-12
(at tilskila í svari)

# Álit

viðvíkjandi klagu um vantandi svar og ógreiða grundgeving frá barnaverndartænastuni í Tórshavn í einum innlitsmáli

Við skrivi, dagfest 30. juni 2020 hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "…
>
> Eg havi fyrr heitt á Løgtingsins Umboðsmann viðvíkjandi eina klagu til Barnaverndina hjá Tórshavnar kommunu, sum eg ikki havi fingið svar frá.
>
> Tann 13/5 2020 fekk eg svar frá Barnaverndartænastuni við B sum sosialráðgeva, at eg skuldi fáa eitt svar frá teimum innan 10 dagar, frá hesum skrivið. ...
>
> Nú 30/6 2020 havi eg enn einki hoyrt, frætt ella sæð frá Barnaverndartænastuni. Eg veit ikki hvussu leingi 10 dagar eru hjá teimum, men sum eg dugi at rokna, so skuldi eg hava fingið eitt svar tann 23/5 2020, men enn er so einki svar komið.
>
> Eg havi tí sostatt fingið tað uppfatan av Barnaverndartænastuni, at tey ella B heldur bæði meg og serliga Løgtingsins Umboðsmann fyri turra spott og gjøldur og hevur als onga virðing fyri okkum sum persónar, tá tey ikki vilja fylgja Løgtingsins Umboðsmann tilráðingar og krav um at svara uppá mínar fyrispurningar...
>
> ...
>
> Til endans vil eg fegin hava at vita, hvat Løgtingsins Umboðsmaður ætlar sær at gera við mín fyrispurning og hvussu leingi eg sum borgari i Tórshavnar Kommunu, skal haldast fyri turran spott og gjøldur av fyrisitingini hjá Tórshavnar Kommunu."

**Málsgongd**

Tann 21. apríl 2020, móttók umboðsmaðurin eina klagu frá A. Í klaguni sást m.a., at A, tann 13. november 2019, hevði biðið barnaverndartænastuni í Tórshavn um innlit í, hví navn hansara var nevnt í einum barnaverndarmáli.

Við skrivi, dagfest 29. apríl 2020, varð klagan send barnaverndartænastuni í Tórshavn til ummælis við einari freist áljóðandi eina viku.

Við skrivi, dagfest 13. mai 2020, sendi barnaverndartænastan í Tórshavn umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu hevur, tann 04.05.20, móttikið eitt skriv, har Løgtingsins umboðsmaður biður um eina frágreiðing, í sambandi við innlitsumbøn hjá A.
>
> Við hesum vil Barnaverndartænastan boða frá, at umsitingin fer at viðgera innlitsumbønina av nýggjum, og at A kann vænta at fáa svar, hesum viðvíkjandi, innan 10 dagar.”

Við skrivi, dagfest 13. mai 2020, boðaði umboðsmaðurin klagara frá, at av tí at gongd nú var komin á málið, helt umboðsmaðurin seg ikki kunna hjálpa honum meira við hesum málinum og gjørdi tí ikki meira við tað.

Tann 1. juli 2020 móttók umboðsmaðurin omanfyri nevndu klagu, dagfest 30. juni 2020.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 3. juli 2020, varð barnaverndartænastan í Tórshavn biðin um, innan 3. august 2020, at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um viðgerðina av hesum málinum.

Tann 4. august 2020 sendi umboðsmaðurin barnaverndartænastuni eina áminning og bað barnaverndartænastuna um at lata sær umbidnu frágreiðingina beinanvegin.

Tann 6. og 7. august 2020 sendi barnaverndartænastan umboðsmanninum tveir teldupostar við viðheftum skjølum, sum barnaverndartænastan hevði sent klagara, m.a. soljóðandi skriv:

> **“Viðvíkjandi Innlitsumbøn tínari**
>
> Vísandi til umbøn tína um innlit tann 31.08.2018 verða skjølini hervið send tær.
>
> Sambært § 4. Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.
>
> Stk. 2. Hann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, kann við teimum undantøkum, ið nevnd eru í §§ 7-11 og § 14 krevja, at fáa høvi til, at gera seg kunnugan við upplýsingarnar. Hetta er tó ikki galdandi í tann mun tey fyrilit, ið nevnd eru í § 13, ella umhugsni fyri honum sjálvum, ella øðrum, avgjørt talar ímóti hesum.”

Við teldubrævi, dagfest 11. august 2020, minti umboðsmaðurin barnaverndartænastuna á, at umboðsmaðurin hevði biðið barnaverndartænastuna um eina frágreiðing um viðgerðina av innlitsumbønini frá klagara, men at so vítt umboðsmaðurin dugdi at síggja, hevði hann ikki fingið hesa frágreiðing enn. Biðið varð um, at umbidna frágreiðingin varð umboðsmanninum í hendi skjótast gjørligt og innan eina viku.

Við teldubrævi, dagfest 12. august 2020, sendi barnaverndartænastan umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "**Viðvíkjandi skriv frá umboðsmanninum dagfest 3. juli 2020, um frágreiðing um viðgerðina av innlitsumbønini frá A.**
>
> Barnaverndartænastan hevur áður upplýst fyri kærara, at hann ikki er partur í málinum og tískil ikki hevur rætt til innlit.
>
> Vísandi til svar okkara, dagfest 13.05.20, var upplýst fyri kærara, at Barnaverndartænastan var sinnað í at viðgera innlitsumbønina av nýggjum.
>
> Sambært fyrisitingarlógini (*innlitslógini, mín viðmerking*) § 4: Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt, sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.
>
> Stk. 2. Hann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, kann við teimum undantøkum, ið nevnd eru í §§ 7-11 og § 14 krevja, at fáa høvi til, at gera seg kunnugan við upplýsingarnar. Hetta er tó ikki galdandi í tann mun tey fyrilit, ið nevnd eru í § 13, ella umhugsni fyri honum sjálvum, ella øðrum, avgjørt talar ímóti hesum.
>
> Vegna stóru skjalamongdina, hevur tað tíverri tikið longri tíð enn væntað at svara kærara og tað eru vit sjálvandi hørm um."

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um vantandi svar og ógreiða grundgeving frá barnaverndartænastuni í Tórshavn í einum máli, har klagari bað um innlit í upplýsingar um seg sjálvan, sum hann helt seg vita liggja í einum barnaverndarmáli. Klagari var ikki partur í barnaverndarmálinum.

Klagari bað um innlit tann 13. november 2019.

Av tí at klagari einki hoyrdi aftur frá barnaverndartænastuni, vendi hann sær, tann 21. apríl 2020, til umboðsmannin við eini klagu um vantandi svar. Umboðsmaðurin bað barnaverndartænastuna um eina frágreiðing um málið. Tann 13. mai 2020 boðaði barnaverndartænastan frá, at klagari kundi vænta at fáa svar innan 10 dagar. Umboðsmaðurin boðaði tí klagara frá, at av tí at gongd nú var komin á málið, gjørdi hann ikki meira við málið.

Tann 1. juli 2020 vendi klagari sær aftur til umboðsmannin, tí hann enn ikki hevði fingið svar frá barnaverndartænastuni. Umboðsmaðurin bað tí barnaverndartænastuna um eina frágreiðing um viðgerðina av málinum. Eftir at hava sent barnaverndartænastuni eina áminning fekk umboðsmaðurin, tann 7. august 2020, avrit av skjølum, sum barnaverndartænastan hevði sent klagara. Í svarinum til klagara varð víst til § 4 uttan at tilskila, hvørja lóg talan var um, og einki var upplýst um, hvørt barnaverndartænastan hevði undantikið nakrar upplýsingar í innlitinum, sum klagari hevði fingið.

Sambært § 21 í fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) skal ein avgerð, sum verður fráboðað skrivliga, hava eina grundgeving, uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti. Sambært § 23, stk. 1 í fyrisitingarlógini skal grundgevingin hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í teimum førum, har avgerðin byggir á eina fyrisitingarliga meting, skulu tey atlit, sum avgerðin byggir á, síggjast aftur í grundgevingini. Grundgevingin skal m.a. tryggja, at móttakarin hevur møguleika fyri at kanna, um avgerðin er røtt, at grundarlagið fyri avgerðini er sakligt, og at málið er nøktandi upplýst, soleiðis at móttakarin hevur eitt grundarlag fyri at taka støðu til, um avgerðin skal kærast til eina kærunevnd ella skal klagast til umboðsmannin.

Í ítøkiliga málinum er tað ógreitt í skrivinum frá barnaverndartænastuni til klagara, um klagari hevur fingið innlit í allar upplýsingar um seg sjálvan í málinum, ella um barnaverndartænastan hevur undantikið nakrar upplýsingar og í so fall hví. Heldur ikki verður tilskilað, hvørja lóg, avgerðin er grundað á. Skrivið til klagara lýkur ikki krøvini til eina grundgeving. Hetta haldi eg ikki vera nøktandi.

Í frágreiðing til umboðsmannin, dagfest 12. august 2020, upplýsti barnaverndartænastan, at viðgerðin av innlitsumbøn klagarans hevði tikið longri tíð enn væntað vegna stóru skjalamongdina.

Sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) skal ein myndugleiki, sum ikki hevur avgreitt eina áheitan um skjalainnlit innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið áheitanina, boðað viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Barnaverndartænastan í Tórshavn upplýsir fyri umboðsmanninum og klagara tann 13. mai 2020, at klagari kann vænta at fáa svar uppá innlitsumbønina innan 10 dagar. Hóast hetta frættir klagari einki aftur frá barnaverndartænastuni. Hetta haldi eg als ikki vera nøktandi.

Um barnaverndartænastan ikki megnaði at avgreiða innlitsumbøn klagarans innan teir 10 dagarnar, sum varð lovað honum, átti barnaverndartænastan at havt boðað klagara frá hesum og orsøkina til tess og upplýsa, nær hann so kundi vænta, at innlitsumbøn hansara varð avgreidd.

Eg haldi ikki, at málsviðgerðin hjá barnaverndartænastuni av innlitsumbøn klagarans hevur verið nøktandi. Eg fari tí at geva barnaverndartænastuni í Tórshavn eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum málinum.

Eg fari at biðja barnaverndartænastuna í Tórshavn um at taka viðgerðina av innlitsumbøn klagarans uppaftur og geva honum nøktandi grundgeving og lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður